# Broytingar í Bussleiðini meðan vegarbeiði er í gerð í R. C. Effersøesgøta




### Steingjan av R. C. Effersøesgøta við SMS

**Vegna vegabeiði verður R. C. Effersøesgøta, frá Egholmstrøð til Húsagøta, stongd fyri allari ferðslu frá leygardegnum 13.05.2000 kl. 14.00, til mánamorgun 29.05.2000 kl. 06.00.**

**Broyting í Bussleiðini:** ***Leið 1***: Koyrir úr Steinatúni , eftir R. C. Effersøesgøta, Gripsvegi, Hoyvíksvegi og Tjaldursvegi til Gundadalsveg, sum síðani koyrir sum vanligt.

***Leið 2:*** Koyrir úr Hoyvík, eftir Staravegi, Heykavegi, Tjaldursvegi, Hoyvíksvegi og Gripsvegi, sum síðani koyrir sum vanligt.

***Leið 3:*** Koyrir úr Steinatúni, eftir R. C. Effersøesgøta, Gripsvegi, Hoyvíksvegi, Tjaldursvegi og Heykavegi, sum síðani koyrir sum vanligt.

**Øll óneyðug tung ferðsla verður víst til at koyra eftir ringvegnum, meðan R. C. Effersøesgøta er stongd.**

Tórshavnar Kommuna



Viðmerking:

# Tað sum vendir niður, vendir upp

Ótrúliga stór orka verður brúkt til at mála svartar myndir í føroyska samfelagnum og at spilla hvønn annan út. Eg hugsi neyvan, at nakað annað fólk í søguni hevur upplivað eina slíka útspilling sínamillum og so nógv ómegdartos, sum vit síggja í føroysku fjølmiðlunum og á tingi í dag. Harafturat verða ikki minst í donskum fjølmiðlum óteljandi lygisøgur, persónligar útspillingar og álop móti landsstýrinum og landsstýrisfólki førd fram frá navngivnum føroyingum - bæði politikarum og øðrum.

Hvørjum skal hetta gagna? Hóast politiskar ósemjur, hugsi eg neyvan, at tildømis danskir andstøðupolitikarar høvdu farið í bretsk bløð at spilt stjórnina út undir eini týdningarmiklari samráðing við bretar. Í okkara føri, vera jú bæði Løgtingið og alt Føroya fólk at fella dóm yvir samráðingarúrslitið, tá tað fyriliggur.

**Ábyrgdarloysi sum politisk hugsjón**

Men eitt er at semjast ella skeldast um okkara viðurskifti við donsku ríkismyndugleikarnar. Eitt annað er okkara búskaparliga framtíð í hesum landi. Vit hoyra nú í ramasta álvara formenninar í størstu andstøðuflokkunum siga, at hetta landsstýrið niðurpínir samfelagið og tí fáa vit heldur onga góða skiftistíð. At vit bara skulu brúka meira pengar, tí so fáa vit eisini fleiri pengar úr Danmark. Hetta er fyrstu ferð vit so greitt hava hoyrt ábyrgdarloysið sett fram sum politiska hugsjón.

Vit kunnu nú bara staðfesta, at við hesi hugsjón er líkamikið, hvat verður gjørt: Tá tað gongur væl, er tað ringt. Og tá tað gongur illa, er tað gott. Tað sum vendir niður, vendir upp. Og tað sum vendir upp, vendir niður. Alt kann brúkast ímóti fullveldisætlanini.

Vit hoyra dag og dagliga frá andstøðuleiðarum, at alt verður niðurpínt undir hesi samgongu, til tess at spara upp til fullveldið. Næstu løtuna hoyra vit frá somu persónum, at pengarnir fossa úr landsskassanum.
Einu løtuna eru vit alt ov fátæk og næstu løtuna alt ov rík.

Um vit høvdu havt somu trupulleikar sum Danmark_ Vit kunnu ímynda okkum, hvussu tað hevði verið, um tað, sum hendir í Danmark, hevði verið hent í Føroyum í dag: Á ellisheimum hava tey eldru verið misrøkt. Eldri fólk verða funnin deyð í síni íbúð eftir hálvum og heilum árum uttan nakran góðan. Bíðitíðirnar til krabbameinsviðgerð halda als ikki. Ungdómur fremur grovan harðskap og dráp. Stórt svik fer fram innan kommunalar og privatar stovnar. Í tí danska matvørustýrinum eru omanfyri 100 milliónir misnýttar. Og so framvegis.

Hetta eru trupulleikar, sum flestu lond hava í vesturheiminum. Eg ivist onga løtu í, at danskir politikarar gera alt fyri at loysa hesar trupulleikar — uttan mun til flokk.

Men hevði tað verið í Føroyum í dag_ á dú, á dú. Fullveldið hevur skyldina! Soleiðis verður tað! Vit klára okkum aldrin! Soleiðis høvdu atfinningarnar rungað.

Men vit hava als ikki tikið ábyrgdina enn. Og tað einasta vit vita við vissu, er, at okkara núverandi trupulleikar eru skaptir undir heimastýrinum. Teir kunnu bert loysast, um vit taka ábyrgdina.

**Stórmál eru loyst**

Nógv liggur á láni í samfelagnum eftir kreppuna. Henda samgongan hevur sanniliga eisini gjørt síni mistøk. Hon skal heldur ikki gykla nøkrum fyri, at alt verður beint og gott komandi árini uttan stór og tung tøk.

Men í veruleikanum eru ótrúliga nógv framstig hend og fara at henda afturat, um vit halda fast um tann ábyrgdarfulla politikkin.

Vit kunnu bara nevna nøkur av teimum týdningarmiklu viðurskiftunum, sum eru loyst seinastu tvey árini. Hesi mál hava annars verið óloyst í mong harrans ár undir skiftandi landsstýrum:

- Fakfeløgini hava fingið lønarhækkingar og aðrar betringar, sum eru tær frægastu í 10-15 ár
- Allar pensiónir eru hækkaðar munandi
- Lestrarstuðulin er hækkaður munandi
- Almanna- og heilsumál eru hækkaði við 137 mió. krónum uppá tvey ár á fíggjarlógini
- Útbúgving, gransking og mentan eru hækkað við 65 mió. krónum uppá tvey ár
- Ætlanir fyri gransking og útbúgving í einum sjálvstøðugum Føroyum eru lidnar
- Mentan og list hava fingið bøttar umstøður
- Studningurin til at byggja skip er strikaður
- Leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum er loystur
- Farið verður næsta ár undir at byggja nýtt landssjúkrahús og at seta tað gamla í stand
- Peningur er játtaður til bæði medisinsk tól og til sjúkrabilar
- Eitt nýtt Sandoyarskip verður klárt fyrsta dagin
- Farið verður næsta ár undir at byggja nýtt Suðuroyarskip
- Eitt nýtt vaktarskip er flotað og tyrlutænastan verður útbygd, som vit sjálvi megna allar uppgávur
- Undirsjóartunnil til Vágarnar er loksins samtyktur
- Bankamálið er loyst
- Undirgrundarmarkið við Bretland er loyst
- Oljuútbjóðingin er væl fyrireikað og klár
- Stórbroytingar eru hendar í okkara sáttmálum við ES, sum hava betrað útflutningsmøguleikarnar
- Vit hava fingið lýst alt okkara samstarv við Danmark og lýst hvat krevst av okkum til fullveldi
- Vit eru komin so langt við samráðingunum, at um politiskur vilji fæst, kann ein sáttmáli gerast millum Føroyar og Danmark, ið gevur okkum fult ræði og fulla ábyrgd av okkara viðurskiftum
- Nýtt og nógv greiðari ábyrgdarbýti millum land og kommunur er sett í verk
- Tær mest skuldartyngdu kommunurnar hava fingið gjaldslætta
- Avtalur eru gjørdar millum land og kommunur, soleiðis at íløgurnar í landinum verða tálmaðar og spjaddar
- Ein langtíðaríløguætlan er gjørd, ið kann fáa samfelagið uppá eitt nútímans støði, út frá tí, sum føroyski búskapurin kann bera.

**Kreppan er ikki av**

Nógv restar í at gera. Men tað kann ikki gerast so skjótt, sum um vit brúktu danskar pengar at blása virksemið uppaftur, fyri síðani at fara á heysin aftur.

Vit eiga at minnast til, at allir búskaparfrøðingar siga, at vandi er fyri ov nógvari ferð á føroyska búskapinum. At um vit ikki halda aftur við almennu útreiðslunum, so stýra vit aftur móti vinnuligum óðamannaverki, skrædli og húsagangi — við fráflyting og niðurskurðum fyri tey veikastu. Hetta er tann veruligi ræðuleikin, sum ikki byggir á pástandir, men á tann kalda veruleikan, sum varð staðfestur fyri bara fáum árum síðani.

Vit eiga eisini at minnast til, at Føroyar eru als ikki



komnar úr kreppuni í 80'unum og 90'unum. Ikki fyrrenn vit hava ein heilt sjálvberandi búskap, kunnu vit siga, at vit eru á beinari leið. Vit hava eina ørgrynnu av økjum, sum hava verið forsømd — ikki bara í 90'unum, men heilt aftur í 70'ini og 80'ini, tá vit blakaðu 13 milliardir á sjógv til alt annað enn haldgóðar íløgur.

Sjúkrahúsøkið — serliga landssjúkarhúsið — hevur verið forsømt við íløgum í 30 ár. Eldraíbúðir og viðurskiftini hjá brekaðum hava onga veruliga raðfesting fingið undir heimastýrinum. Strandferðsluflotin somuleiðis.

Tí kunnu bert varlig framstig gerast nú, sum tryggja, at vit ikki aftur fara útav eggini.

Annars fara ræðumyndirnar at ganga út. Ikki við fullveldi, men við ongum valdi og ongari ábyrgd.

**Høgni Hoydal**

# Norðurlendsk giktafeløg hittast

Í vikuskiftinum verður Giktafelag Føroya vertur fyri einum norðurlendskum ráðsfundi millum giktafeløg í Norðurlondum. Tvær ferðir árliga møtast feløgini hjá hvørjum øðrum, og hesa ferð eru Føroyar vertur fyri ráðnum. Tað verða tvey umboð fyri hvørt Norðurland og m.a. verða hesi evni viðgjørd:

Viðgerð - IT - Internationalt samstarv - Kunningartilfar - Gransking - Nýggir heilivágir og kostnaðurin - um tørvin innan giktalæknar.

Tey norðurlendsku giktafeløgini, sum er úr Svøríki, Danmark, Noreg, Finland, Ísland og Føroyum, eru knýtt saman í eitt ráð, sum nevnist Nordisk Reuma Råd. (NRR).

Giktafelag Føroya varð í 1997 innlimað í NRR og fekk sama sjálvstøðuga rætt sum hin Norðurlondini. Giktafeløgini teljast millum tey størstu feløgini í Norðurlondum, og bara í Danmark eru 80.000 limir. T.d. letur danska felagið fleiri milliónir til gransking árliga.

NRR hevur ein arbeiðssetning:

- Kunna um giktasjúkurnar, um viðgerð, fylgjurnar av sjúkuni.
- Møguleikarnar fyri felags norðurlendskari útbúgving og gransking verða víðkaðir.
- Samstarva norðurlendskt í giktafeløgunum.
- Vinabýavirksemið verður økt, eisini á giktaøkinum.
- Samstarva internationalt.

WHO hevur viðtikið, at frá 2000 til 2010 skal í øllum heiminum verða fokuserað uppá sjúkur í rørslulagnum og viðgerð av hesum sjúkum.

Giktafeløgini vilja samstarva fyri, at norðurlendsku heilsuministararnir verða kunnaðir um manglandi fakpersonali innan Revmatologi. Útbúgvingarnar eiga at gerast meira spennandi og meiri upplýsing eigur at fara fram á universitetunum og heilsuskúlum innan hesar sjúkur.

Giktarakt fólk krevja, at serútbúgvin lækni tekur sær av teimum. Fyri at fáa eina diagnosu so tíðliga sum møguligt, krevst at læknin er spesialist á økinum. Gikt rakar fólk í øllum aldri, bæði børn og vaksin. Tey flestu verða rakt í arbeiðsførum aldri. Gikt er sera pínufull og niðurbrótandi fyri likamið.

Giktsjúkan er dýr fyri samfelagið. T.d. innleggingar, heilivágur, uppvenjingar, skurðviðgerðir, hjálpartól, persiónir o.a.

Í Danmark er samlaði kostnaðurin fyri statin – ca. 29 mill. kr. – í Finnlandi 9 mill. FIM – í Svøríki 49 mill. SEK, og í Íslandi 14 mill. ÍSK. Vit hava ongi tøl fyri Føroyar.

Skjót diagnosering og skjót viðgerð kann fáa kostnaðarstøðið munandi niður, við at fólk verða verandi úti á arbeiðsmarknaðinum, færri innleggingar, færri skurðviðgerðir.

Danska giktafelagið hevur nýliga lagt eina sera spennandi og upplýsandi »giktamiðstøð« út á alnótina. www.gigtbasen.dk. Henda støðin vendir sær bæði til sjúklingar og viðgerðarar.

Í komandi blaðnum hjá Giktafelag Føroya fáa limirnir frágreiðing frá norðurlendska ráðsfundinum.

Giktafelag Føroya telur slakar 400 limir og at felagnum eru knýttir tríggir undirbólkar, foreldrabólkurin, ungdómsbólkurin og fibromyalgibólkurin. Felagið gevur 2-3 bløð út um árið, har føroysk viðurskifti verða viðgjørd, so sum fyrilestrar og skeið.

Giktasjúklingar í Føroyum eru ikki so væl fyri við t.d. arbeiði, venjingarmøguleikum osfr. Ert tú ikki úti á arbeiðsmarknaðinum sum onnur, ella mást tú úr starvi tínum, tí tú ikki klárar starvið sum tú hevur, so er einasta alternativ pensión. Vard størv eru ongi, viðgerðarmøguleikarnir eru ikki serliga góðir, fráfarandi lækni fær ongan avloysara, so framtíðarvónirnar eru ikki av teimum bestu.

Felagið royndir at kunna myndugleikarnar um støðu giktsjúklinganna, men sum nú er er onki ítøkiligt uppskot um, hvussu vit loysa hesar stóru trupulleikar.

Felagið hevur skrivstovu í MBF-húsinum og er opið mánadag millum kl. 14–16.

LÆRUPLÁSS Í ELDING • LÆRUPLÁSS Í ELDING

**Lærlingar**
**til Elding í Runavík og Klaksvík**

Til handlarnar í Runavík og Klaksvík søkja vit eftir lærlingi at byrja beinanvegin.

Elding er førandi innan sølu av hvítvørum, tónleikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert læruplváss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 25. mai 2000 og skal sendast til Elding í Runavík ella Elding í Klaksvík, alt eftir hvar tú vilt søkja:

**Elding í Runavík**
Heiðavegur
600 Saltangará

**Elding í Klaksvík**
Stangavegur
700 Klaksvík

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697